Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

AUDI 100 1,8
árg. 87, koyrt 207.000 km, heilgalvaniseraður, koyrir uml. 10 km/l, til sølu fyri 15.000 kr. Eisini kunnu góð píkadekk á Audi/VW felgum fáast við fyri 2.000 kr. afturat.
Tlf. 251703

PÍKADEKK
2 sett av píkadekkum, Good Year 155/20 13 til sølu.
Tlf. 444103

TOYOTA CROWN 2.8i
super saloon, partvíst sundurtikin til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 217661

TOYOTA COROLLA 1.6 GTI
árg. 88 til sølu.
Tlf. 449089 ella 0045 28430522

NÓGVIR
eykalutir til Pajero til sølu, m.a. bakhurð, nýggjur forskermur, »kengurufangari«, hjelmur, turbina, powerstýring, spegl o.a.
Tlf. 217322

LYKTIR
til Daihatsu Charmant til sølu. Vinstra forlykt og báðar baklyktirnar til sølu.
Tlf. 217322

AUDI 100 1.8
árg. 87, koyrt 207.000 km, heilgalvaniseraður, koyrir uml. 10 km/l, til sølu fyri 15.000 kr. Eisini kunnu góð píkadekk á AUDI/VW felgum fáast við fyri 2.000 kr. afturat.
Tlf. 251703

GÓÐ DEKK
Tvey góð dekk til sølu 155/70 x 13 R. 1 kølari til Fiesta 1.3, árg. 96.
Tlf. 315885

BILHÁTALARAR
2 Pioneer stereo bilhátalarar, eru nýggir, ikki bruktir, hava kostað 1600 kr. nú 500 kr. eru 60 w.
Tlf. 319613

MITSUBISHI COLT 1.5 GL
árg. 86, sýnaður 5/2000, koyrir sera væl, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 317354 ella 222002

VW PASSAT
árg. 83 viskaramotorur ynskist og eykalutir.
Tlf. 254349 Jangrím

TIL SØLU
4 14" foundmetal sportsfelgur við góðum dekkum. Tær hava fimm hol og siggja gott út.
Tlf. 315439

SLEIPIKRÓKUR
nýggjur til Mazda 323F, model 1998 v/kápilsett til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 212600

MITSUBISHI GALANT
1800 turbo diesel, sum eykalutir, sýnaður 99, koyrir, prísuppskot 3.000 kr.
Tlf. 319313

PÍKADEKK Á FELGUM
4 píkadekk á felgum til Toyota Corolla til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 318639

VW GOLF 1.8 GTI
Árg. 87, alu felgur, er í góðum standi, sær sera gott út innan og uttan.
Tlf. 374455, eftir kl. 18

OPEL ASTRA
18 mðr. gamal, einans koyrt 25000 km sær út sum nýggjur til sølu fyri 145.000 kr.
Tlf. 317912

FORD ESCORT 1.6
Ghia, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 421182

BILGARASJA
ella líknandi høli til min. 2 bilar ynskist til leigu skjótast gjørligt.
Tlf. 221176

BMW 320i
sýnaður juni 2000 til sølu.
Tlf. 423591 ella 219171

PÍKADEKK
4 góð píkadekk 165/80-R13 á felgum til Opel Ascona 1 ára gomul, til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 375090

FELGUR
4 aluminiumsfelgur 14" til Honda Civic til sølu.
Tlf. 220206 ella 361258

FORD GRANADA
Ein Ford Granada 2.3 L árg. 86. Bilurin hevur ongar plátur, nakað av nýggjum eykalutum fylgja við.
Ein BMW 316 árg. 86/87 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 212710

MAZDA 323 1.3
til sølu. Bilurin er árg. 86 og verður seldur fyri 4.300.
Tlf. 222091 ella 445091

EYKALUTIR TIL
Toyota Corolla, árg.84, til sølu.
Tlf. 315140, eftir kl. 18

ROVER 600
Svartur, nov. 99, 200 HK turbo, ljósagrátt leður inntrekk og cd-spælara, originalar 16" sportfelgur og 15" vetrardekk á felgum. Hevur koyrt 19.000 km og er sera vælhildin. Verður bert seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221300

MAZDA 626
2.0 i GXL, árg. 08/92, koyrt 130.000 km, litur myrkt vínreytt metallak, hevur sentrallás, servo-stýring, 15" alu-felgur, el-rútar og el-spegl í góðum standi. Sæst í leitel.fo
Tlf. 221222

NISSAN SUNNY
i6 SLX, árg.89, koyrt 138.000 km.
Tlf. 315393, 317367

NISSAN SUNNY
Ein Nissan Sunny 1.6, 11 ár, til sølu.
Tlf. 224711

HONDA CIVIC 1.5 LS
v-tec, árg. 8(98, 3 hurðar, vel, 16" sportfelgur til sølu.
Tlf. 222399

NISSAN BLUEBIRD T12
árg. 87, nýsýnaður, sær sera gott út, til sølu.
Tlf. 214232/317726

TOYOTA CARINA II
Nógvir góðir eykalutir til sølu til Toyota Carina II, árg. 88.
Tlf. 319801 ella 212235

HYUNDAI SONATA
2.0, myrkabláur, koyrt 57.000 km, árg. 11/96.
Tlf. 315920 ella 284251

MAZDA 323 1.5 LX
árg. 88, koyrt 122.000 km, vælhildin, til sølu.
Tlf. 456507/216507

HONDA ACCORD 2.0
árg. 10/90, nýsýnaður, nýlakeraður, 16" sportfelgur + fýra píkadekk á felgum, cd-radio, ikki roykjarabilur. Til sølu fyri 85.000 kr.
Tlf. 222780

VOLVO 440
árg. 89, við heilársdekkum, nýsýnaður til sølu.
Tlf. 316369 ella 282676

BMW FELGUR
til sølu. 17" x 8 1/2" Split felgur til BMW 5 og 7 seriuna við 4 dekkum (225 x 40) harav 2 nýggj. Prísuppskot kr. 10.000,-
Tlf. 319489 ella 219489

UMBÝTI
Bilur ynskist í umbýti við hús í Fuglafirði.
Tlf. 223492

PEUGEOT 205 XS
árg. 88, sýnaður í sept. 2000 til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 314569

BÁTUR YNSKIST
Glasfipur bátur við dekki ynskist. Stødd uml. 23-27 føtur.
Tlf. 223149 eftir kl. 17

OPEL MANTA GSI
Sýnaður í jan. 2000, til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 315285 ella 215285

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 87 til sølu sum eykalutur. Bilurin hevur ongar plátur. Best aftaná kl. 15.
Tlf. 448605

BILANLEGG TIL SØLU
Pioneer anlegg við bandupptakar og 12 cd box til sølu fyri 5.000 kr. Nýprísur 10.400,-
Tlf. 221769 ella 447740

OPEL REKORD 2.3
diesel til sølu.
Tlf. 455919

FORD ESCORT 1.3
árg. 83, nýggjar bremsuskivar, trumlir, rør og slangur. Skal um umsýn, krevur ábotur. Biliga til sølu.
Tlf. 444279

MERCEDES 300 D
Stationvognur 7 setur, árg. 12/84 til sølu.
Tlf. 315062

Arbeiði

HAVAARBEIÐI
Eg átaki mær at lúka, rudda, v.m. í tínum hava - uppá tilboð.
Tlf. 318408

ARBEIÐI YNSKIST
Genta 15 ár ynskir arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Ring 315634

DECRA TAK
Søkt verður eftir vælroyndum monnum at leggja tak á beinanvegin. Kom við einum tilboð til Hera á
tlf. 219318

ZONETERAPEUTUR
Sanna Hentze
Fugloyarvegur 10
Tlf. 316114 eftir kl. 15

ARBEIÐI SØKIST
16 ára gomul genta, liðug við 10. flokk, søkir arbeiði. Er von at standa í handli. Alt hevur áhuga.
Tlf. 457142

RENGØRING
m/k søges til rengøring ca. 2 timer pr. uge.
Tlf. 316027 lok. 404

EG ERI
ein 17 ára gomul genta, sum søkir arbeiði eftir skúlatíð. Eg havi arbeitt í handli fyrr og eg havi eisini ansa nógv eftir børnum.
Tlf. 210010, Anna

REINGERÐ YNSKIST
Reingerð ynskist 2-3 tímar um vikuna.
Ring 315042 aftaná kl. 18

GOTT TILBOÐ
Eg eri ein genta, 11 ára gomul og tilreiðar at arbeiða. T.d. havaarbeiði, hjálpa til inni ella ganga ørindir.
Ring 321834, Røskva

Barnaansing

SØKT VERÐUR
eftir barnagentu, at ansa tveimum gentum, 4 og 1 ár, umleið 15 dagar um mánaðin.
Tlf. 319036

SØKT VERÐUR
eftir gentu at ansa 11 mðr. gomlum barni heima hjá okkum, frá hálvum oktober.
Tlf. 319068

ANSING
Eg átaki mær at ansa barni millum 4-6 ár.
Vinarliga ring tlf. 318484

Barnaútgerð

BILSTÓLUR
stødd 9 mðr. til 4 ár, til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 316099

VOGNSELI
at nýta í barnavogni, til sølu fyri 75 kr.
Tlf. 316099

SYSTKINASETUR
at seta upp á barnavogn, til sølu fyri 75 kr.
Tlf. 316099

BARNASONG
Hvít rimasong v/ madrassu, alt í góðum standi, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 316099

BABY
autostólur, lilla 0-9 kg. til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 372800

SCANDIA
barnavognur, gráur leður-look barnavognur í góðum standi, rúmligur og robustur, til sølu fyri 1.500 kr. við lift.
Tlf. 372800

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Vælhildin myrkabláur Simo koyristólur við ternutum myntsri, við koyriposa og regnslag til sølu fyri 1/2 prís.
Tlf. 320211

TEUTONIA KOMBOVOGNUR!
Lítið bruktur kombivognur til sølu. Er í sera góðum standi. Babylift, madrassur og regnskjól/flugunet fylgja við. Kr. 2.000,-
Tlf. 313858 eftir kl. 18

TIL SØLU
Ein stólavognur við galesju til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316016 el. 214884

SILVER CROSS
barnavognur til sølu. Vognurin er myrkagrønur, bert bruktur til eitt barn.
Tlf. 457751

BARNASETUR
at seta omaná barnavogn ynskist til keyps.
Tlf. 319404

MYRKABLÁUR
Simo vognur undir 1 ár, vælhildin. Lyft við er góðkent til bil, bilstólur upp til 13 kg. og ein skrástólur.
Tlf. 216680

KOYRISTÓLUR
ynskist til keyps, skal vera væl viðfarin.
Tlf. 320130

Bátaútgerð

TIL SØLU
Ein BMW Marine motorur 3800 1/m 132 kw (180 hestar) til sølu fyri 1.500 kr. Vælegnaður til eykalutir. Sniðið er D6 36 TA.
Tlf. 217177

EITT
føroyskt frambygd 7-mannafar við 10 HK Sabb motori til sølu.
Tlf. 310286

10 mannafar
lítið brúkt hevur Volvo TMD -30-86 HK bíliga til sølu. Krevur ábotur.
Tlf. 421472

BÁTUR
Ein 28 fót føroyskt bygdur bátur, 32 hK Leyland. Diesel til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 441284

PERKINS-MOTORUR
40 hk Perkins-motorur Volvo-gear bíliga til sølu (egnaður til ljósmotor).
Tlf. 444189 aftaná kl. 18

Bingo

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður leygardagin 7.10. kl. 19.00 Full pláta 400 kr. á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Eykaspælið 1600 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Lýsingar tekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:
❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræva skifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....
Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

SUÐRINGAR!
Stórt seyðabingo verður mánakvøldið 9.10 kl. 19 í skúlanum í Trongisvági. 20 seyðir vera at vinna og nógv annað gott. Eykaspæl verður.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
verður í Havnar klubba mánakvøldið 9.10. kl. 19. Nógvir góðir vinningar m.a. skerpikjøt. 15 vinningar á lutaseðlunum, m.a. 2 føroysk krov. 15 plátur 100 kr.
Astma- og Allergifelagið

BINGO
verður í Ítróttarhøllini á Kambsdali 8.10.2000.
IF

BINGO
verður í Felagslonini hóskvøldið 5. okt., kl. 19.30. Høvuðsvinningur 1 lamb.
Fuglafjarðar Pensionistafelag

STÓRT SEYÐABINGO
Leygardagin 7.okt kl. 16, verður stórt seyðabingo í bygdarhúsinum í Kollafirði. At vinna verða 15 lomb, feskt neytakjøt, flettingarborð o.a. Høvi verður eisini at vedda um vektina á tveimum tvæveturssveðrum. Veðrarnir og lombini verða flett, og vinnararnir fáa krov og avroð heim við aftaná bingoið. Um kvøldið spælir »Bjørn Djurhuus band« til dans.
Kollafjarðar Fornminnisfelag

Bøkur

BØKUR TIL SØLU
Eg havi nógvar HF- og 1.-2. student bøkur til sølu, um nakar enn mangar at keypa.
Tlf. 316813 eftir kl. 17

Burturm. /funnið

SVARTUR
Kontoln ryggsekkur burturmistur í einum balli við Landavegin í Havn í juni/juli mánað, hevur nakar funnið hann, so vinarliga ring á
tlf. 341341, Lív Thomsen

TANN
ið hevur tikið eitt stál armbandsur, leinkjan er í liðum, við hvítari skivu og dato og eitt reytt/orange litað perluarmband úr taskuni í hondbóltshøllini í Gundadali, verður vinarliga biðin um at lata tað til húsavørðin í høllini ella ringja
tlf. 316464

GRÁ
(ikki fullvaksin) ketta horvin 23.9. í J. C. Svabosgøtu 8. Kettan hevur ongan hala, men hevur tumlar. Veit nakar at siga okkum hvar hon er, høvdu vit blivið ógvuliga fegin.
Tlf. 314757

TASKA
Ein grá East Pack taska við einum Only Cowboy jakka og svartri rullukraða troyggju í, bleiv burtur í dansinum á Kambsdali leygarkvøldi. Tann, ið veit um taskuna at siga, vinarliga ring
tlf. 422368

ER TAÐ NAKAR
sum hevur funnið eina (Siemens) fartelefon fríggjanáttina 1.9. í Klaksvík, so vinarliga ring
tlf. 452154

KETTLINGUR
Svartur hálvvaksin kettlingur tikin upp á Farstøðini. Eigarin verður vinarliga biðin at ringja.
Tlf. 311823 ella 288822

Býli

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru eitt par á 24 og 31 ár, ið søkja íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Bæði hava fast starv og eru friðarlig. Kostnaður max. 4500 við ljós og varma.
Tlf. 251106 best eftir kl. 17

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru tvær friðarligar gentur sum søkja eftir einari íbúð á Glyvrum, Runavík ella Saltangará frá 1. januar. Vit roykja og drekka ikki!
Tlf. 422772 ella 457118

EINLIG
tilkomin kvinna søkir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Friðarlig og roykir ikki.
Vinarliga rint tlf. 211966

HØLI TIL LEIGU
Høli til leigu í Havn. 30 fermetra stór høli nærindis miðbýnum í Havn eru til leigu frá 1. november. Væl egnað til skrivstovu ella sum íbúð við inngongd beinleiðis frá vegnum. Kostnaður 3.000 kr.
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill.mrk. 9335

KEYPMANNAHAVN
3 ver. íbúð við ollum fæst til leigu frá 15. febr. til 25. mars 2000. Stað: Frederiksberg.
Tlf. 33257075

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
ynskist til leigu í Havn frá 1. nov. 20+00.
Tlf. 320443 lokal 173

UNGUR MAÐUR
søkir íbúð/verilsi skjótast gjørligt. Eg havi fast arbeiði, økonomi eingin vandi. Eg eri at hitta á
tlf. 315214 ella 215214

KAMAR TIL LEIGU
Gott kamar til leigu, 5 min. gongd til læraraskúlan, við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu og myntetelefon.
Tlf. 313799

HYGG HER
Lítil íbúð, ella stórt kamar ynskist.
Tlf. 361265 eftir kl. 18

KAMAR/ÍBÚÐ
Ung genta søkir íbúð ella stórt kamar í Havn skjótast gjørligt.
Vinarliga ring 361412 eftir kl. 18

KJALLARAÍBÚÐ
ynskist til leigu í Havn ella nærhendis til trúgvandi fólk. Má hava 2-3 kømur.
Tlf. 216151, 283812 ella 316716

BYGDARSTOVAN
í Hesti verður leigað út. Møguleiki er fyri at svimja. Áhugað kunnu ringja
tlf. 328023

Dansur

DANSUR Í ØRAVÍK
Ragnar í Vík og tónleikabólkurin Bacon fara at spæla góðan countrytónleik leygarkvøldið 4. november.

Dýr

TIL SØLU
Kanin (hannur) til sølu fyri 100 kr. við húsi.
Tlf. 316378

AKVARIUM
60 l. pumpa, ljós + 3 skjaldbøkur til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 451182 best eftir kl. 18

2 DVØRGAKANINIR
ynskjast til keyps.
Tlf. 310181

HYGG HER
2 fittir hundahvølpar fáast við at avheita teir, teir eru sera fittir.
Tlf. 441043

KETTLINGUR
Fittur tumlafrensur verður latin djóravini.
Tlf. 311267

HUNDAHVØLPAR
sera fittir, svartir og eitt sindur hvítir, eru vanir við børn og kettir, mamman er labrador.
Tlf. 372113

EIN SERA
fittur hann hundahvølpur undan labrador tík, verður latin djóravini.
Ring 315214 ella 215214

NEW FOUNDLENDARI
ynskist. Eg eri ein genta, ið fegin vil hava ein New Foundlendara hvølp. Er tað nakar, ið kann hjálpa mær?
Vinarliga ring 221376

Fundir

AÐALFUNDUR
verður í høll felagsins 20. okt. 2000 kl. 19. Skrá smb. lógum felagsins.
Badmintonfelagið í Havn

PENSIONISTA Í HAVN
Fundur verður í Losjuni. Mikukvøldið 04.okt. kl. 19. Vit gita orðatøk.
Nevndin

Húsarhaldstól

SPÍSISTOVA TIL SØLU
Talan er um spísistovumøblar úr massivari eik í vøkrum gomlum stíli, samansett av: spísiborði á 82x160 cm + tvær plátur á 45 cm, 5 útskornum stólum og einum hornaskápi. Alt til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 316099

TIL SØLU
1 ára gomul vaskimaskina Haka 3350, 800 umdr. til sølu fyri 1.500 kr. vegna flyting.
Tlf. 251107, 318808 ella 313956

Innbúgv

SPÍSIBORÐ TIL SØLU
Spísiborð úr furu, lakerað, 70x110 cm, bert nýtt í hálvt ár, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 316099

VELOURSOFA
og tveir stólar til sølu fyri kr. 5.000,- og eitt kaklakborð stødd 76x46 cm.
Tlf. 316119

YMISKT TIL SØLU
Svørt leðursofa, 3+2 til sølu fyri 2.000 kr. Ljóst sofaborð 200 kr., ljóst 8-kantað spísiborð við 2 eyka plátum 700 kr, sær gott út.
Tlf. 455878

KOMMODA, STÓLAR
Ljós furutræ kommoda við 3 skuffum. 2 stólar, forniklað rør, hvitt leðursetur og rygglen. Hvítt vask við síðupartí til sølu.
Tlf. 314213 ella 315622

KØKSVASK
við krana til sølu. Stødd 46 x 40 cm. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 321291

RUNT SPÍSIBORÐ
Sera vakurt, oljuviðgjørt borð til sølu vegna plásstrot fyri 4.000 kr. 110 cm. í tvermát + plátustykkið 50 cm. fylgir við.
Tlf. 321291

SOFASETT
3 + 1 + 1 , gráligt, sera væl viðfarið til sølu vegna broytingar. Prísur 3.000 kr.
Tlf. 321291

SOVISOFA
Tvey ára gomul sovisofa (tylon) 120 x 200 til sølu fyri 2500 kr. Nýprísur 5200 kr.
Ring 315034 ella 251090

YNSKIST
Er tað nakar, sum kann selja mær tveir spísistovustólar, helst gamlar, teir skuluera av træ ikki teak, og hava útskorið bak, tað ger einki um teir eru skamfílaðir.
Tlf. 448605

TIL SØLU
Tvær boxmadrassir 90 x 200 til sølu.
Tlf. 448679

Leikur

DUKKU-PUSLIBORÐ
við baðikari til dukkur (baby-born) til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 316099

YNSKIST TIL KEYPS
Lego, Duplo/stórir klossar ynskist til keyps.
Tlf. 319404

LEIKUR TIL DRONG
ynskjast til keyps fyri ein bíligan penga. T. d. lego, playmo, Action-men, Hemen o.a.
Tlf. 448605

Lutaseðlar

NEYTALORTAKAPPING
Frá Fuglafjarðar Svimjifelag. Neytalortakappingin er flutt til leygardagin 07. okt. kl.11.
Nevndin

LUTASEÐLASØLAN…
hjá skálanum við Skála. Hesi nr. vunnu: Møttil til føroysk klæði nr. 10908 (gráur). 250L av olju nr. 10771 (gráur). Barnasett, silvur til føroysk klæði nr. 19802 (gulur). Poncho til barn nr. 10827 (gráur). Hálsprýði av silvuri nr. 34275 (ljósareyður). Armband nr. 34377 (ljósareyður). Ruth Smith plakat nr. 34383 (ljósareyður). Tiltakið á jóansøku - Atgongumerkið nr. 22894 (ljósabláur). (Snarferð til Bergen við Norrønu fyri 2 pers. Íroknað tað kalda borðið, er ikki avheintaður enn). Lurtirnir fáast við at venda sær til tlf. 373044
Takk fyri stuðulin
Skálin við Skála, Vági

Matur

AVROÐ TIL SØLU
koyrt verður til dyrnar í Streymoy og Eysturoy.
Tlf. 423442

GÓÐ AVROÐ!
kunnu bíleggjast nú.
Tlf. 422228

Pløgg

MARGARINFABRIKKIN
Gloymd klæðir á Margarin fabrikkini liggja frammi frá mánadegnum 2.10. til og við fríggjadagin 6.10. millum kl. 13-17. Klæðir, ið ikki verða heintaði, verða send hjálparfelagsskapum.
Margarinfabrikkin

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Lilly model, stødd 36, við hettujakka og skógvar, stødd 37, til sølu. Bert brúkt til várkonfirmatiónina 2000.
Tlf. 316121

JUDODRAKT
Ein judodrakt std. 160 til sølu fyri 250 kr.
Ring 316813 eftir kl. 17

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
str. 36 og skógvar nr. 37 til sølu fyri tilsamans 400 kr.
Tlf. 332580

Samband

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein maður, sum er seinast í 50'inum, sum ynskir at koma í samband við eina fitta kvinnu, sum er ímillum 50-60 ár. Eg eri ein stillur og friðarligur maður, eg eri ikki nakar ófriðarkroppur og geri ikki hønu halta, eg royki ikki og drekki ikki. Mær leingist eftir at koma saman við einum fittum maka, eg vóni, at tú sum lesur hetta bræv, vil seta teg niður og skriva nøkur orð til mín. Er hetta nakað fyri teg, ella ert tú áhuga, so góða tú skriva til mín.
Bill. mrk. 188305

SAMBAND
Maður síðst í 40'unum søkir kvinnu 25-50 ára aldri. Ikki neyðugt at vera føroysk, mynd ynskist. 100% tagnarskylda. Børn eingin forðing. Havi fast arbeiði, bil og egnan bústað.
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill.mrk. 933140

KVINNA SÍÐST Í
40'unum ynskir samband við mann 50-55 ár, ið ikki drekkur ov nógv av sterkum drykki. Um áhugi er, so skriva til
Bill. mrk. 188180

MAÐUR Í 30'UNUM
ynskir samband við kvinnu 24-37 ár. Havið egið hús, fáist eisini eitt sindur við matgerð. Mær dámar at hyggja í sjónvarp, lesa, gongutúrar o.a. Børn ongin hindring. Um tú ert áhugað so skriva til bill.mrk. og fortel
eitt sindur um teg sjálvan.
Bill. mrk. 188232

Súkklur

MOTORCROSS
Yamaha 125 SK YPVS til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 252653

KONDISÚKKLA YNSKIST
Hevur nakar eina góða, brúkta og bíliga kondi súkklu at selja mær.
Tlf. 423249

KNALLERT YNSKIST
Ikki kosta meira enn 5.000,- Hon skal vera í góðum standi.
Tlf. 315991

Teldur

TELDA TIL SØLU
466 mHz, 6,8 GB, 17" skermur v/modem. Ring og hoyr meira á
tlf. 319597 ella 219597

COMPACT
telda v/Windows 95 til sølu fyri 1.700 kr.
Tlf. 451024

GÓÐ BÍLIG TELDA
Hevur tú tørv á einari góðar teldu, sum bara virkar, so havi eg eina Fujitsu, sum er 200 mhz, 2GB hardist, sum eg ætli mær at selja fyri 2.500 kr.
Tlf. 310552

COMMONDORE
Ein Commondore 386-33 mhz, pc, 14" skerm v/3,5" og 4 3/4" disklastoð + nøkur spøl.
Tlf. 332246
eftir kl. 17

YMIST TIL SØLU
Canon PC-20 kopimaskina til sølu fyri 1.500 kr. Microtek Scaner til sølu fyri 900 kr. Epson stylus pro litprintari til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 213088

LJÓÐKORT TIL SØLU
SoundBlaster AWE32 ljóðkort til PC til sølu fyri einans kr. 249,-
Tlf. 310441 ella
tab@post.olivant.fo

Tónleikur

BARNAKEYBOARD
Yamaha PSS-26-4 oktavir og 99 voices til sølu. Kann spæla trummir og rútmukontrol, stativ fylgir við.
Tlf. 448271

PLÁTUSPÆLARI
Ein fult autom. plátuspælari til sølu fyri 500 kr., nálin manglar.
Tlf. 316016 ella 214884

EL-GUITAR TIL SØLU
Bláur G & L F-100 Series 1, Solidbody frá 1980. Í serstakliga góðum standi. Eina 5way switch og eina out-of-phrase switch. Diskant, bass og volume knob. Hevur ómetaliga nógvar møguleikar v.v. ljóði. Flightcase og ein fuzzpedal kann eisini fáast til. Ring um nærri upplýsingar.
Tlf. 317161, Fróði

MAISON
Ein brúnur elektriskur kassa-guitari til sølu, lítið og einki bruktur v/kassa.
Tlf. 220002 ella 310215

Út- & Sjónvarp

PARABOLSETT
Analog Pace kassi við skál, høvdi og korti til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 310009

TIL SØLU
Stereoanl. forsterkari á 2 x 100 W ella 4 x 75 W, mini-disk, cd-spælari, tunari, equalizari, alt av merkinum Kenwood og 2 x Jamo 330 W hátalarar. Nýprísur 25.000 kr. minsta boð 17.000. Bert 2 ára gamalt.
Tlf. 223360

PARABOL TIL SØLU
Digital parabol til sølu, 9 mðr. gomul, vegna flyting (100 cm) 25 m. kápil.
Tlf. 214232/317726

TELEFUNKEN 28"
Telefunken 28" sjónvarp til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 316535 ella 216535

Ymiskt

GLASFILT TIL SØLU
200 fermetrar av glasfilti til sølu fyri 5 kr./m.
Tlf. 316099

BUSKAR TIL HEKK
stórir góðir buskar til sølu.
Tlf. 318930

NOKIA 3210 GSM
dual band telefon til sølu, vigar bert 151 gr. Standby 260 tímar, talutíð 4,5 tímar, innbygda antennu. Eyka við: 2 cover, Copper Red og Rocket Silver og hondfrítt, snigil og mikrofon, prísur 1.200,-
Tlf. 211800

NMT 450
Ein NMT 450 fartelefon við tlf. nr. og tilhoyri, bíliga til sølu.
Tlf. 317255/217255

BARNABILSTÓLAR
Tveir barnabilstólar upp til 13 kg. til sølu fyri 500 kr. stk.
Tlf. 312359 eftir kl. 17